## Keane ella Hughes í United

Danski málmaðurin Peter Schmeichel, sum í 9 ár var málmaður í Manchester United, heldur, at serliga tveir venjarar høvdu kunnað loyst Alex Ferguson av í Manchester United, tá ið hann gevst. Schmeichel heldur, at fyrrverandi spælararnir í United, Mark Hughes ella Roy Keane høvdu klárað at loyst Ferguson av. Ferguson hevur verið venjari hjá United síðani 1986.



## Lyngby nærkast niðurflytingini

Eftir at Lyngby í gjár tapti í superliguni, er liðið komið nærri niðurflytingini úr superliguni, og hósdagin kann niðurflytingin verða endaliga staðfest. Christian Lamhauge Holst var ikki við í dystinum ímóti FC Midtjyllandi í gjár, men hinvegin byrjaði Tem Hansen á miðvøllinum. Hann var útskiftur í seinna hálvleiki. Dysturin endaði við 2-1 sigri til Lyngby.

# Bartal kann fáa leikbann

**Kappingarnevndin hjá FSF fer at viðgera, um viðmerkingarnar hjá Bartali Eliasen eftir dystin hjá ÍF í Runavík mikukvøldið skulu fáa avleiðingar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað skal fáa avleiðingar, tá spælarar ella venjarar sýna ein atburð, sum fer út um mark.

Tað tykist vera greiða støðan hjá Kappingarnevndini hjá Fótbótlssambandinum.

Sonevnd disciplinær-leikbann hava ikki verið vanlig í Føroyum, men í ávísum førum hevur hetta verið frammi. Eitt nú fekk Sigfríður Clementsen leikbann fyri tveimum árum síðani, tá táverandi B36-venjarin endaði orðadrátti við dómara eftir dyst. Ta ferðina hevði dómarin annars ikki viðmerkt hetta í síni frágreiðing um dystin, men leikbannið varð kortini givið av FSF.

Mest merkisvert ta ferðina var tó, at ógvuslig úttalilsi frá øðrum venjara fáar vikur seinni einki eftirspæl fingu.



*Bartal Eliasen var stóra hetjan í Fuglafirði sunnudagin. Men tað er ikki óhugsandi, at hann verður leikbannaður, tá ÍF komandi vikuskifti spælir útidyst móti EB/Streymi*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

### Persónligt mark

Eftir tapið hjá ÍF í Runavík mikukvøldið, er spurningurin tó aftur vorðin aktuellur. Fuglfirðingar vóru alt annað enn nøgdir um dómaraavrikið hjá Rúna Højgaard í dystinum mikukvøldið. Somikið stór var ónøgdir, at felagið sendi inn kæru um hetta, og tá Bartal Eliasen eftir dystin gjørdi sínar viðmerkingar til Útvarpið, var hetta við alt annað enn penum orðum. Orð, sum eisini fingu varaforsetan í FSF, Niklas á Líðarenda, at siga sína hugsan á Rás2 fríggjadagin.

Og tað er ikki bara Niklas á Líðarenda, sum hevur fingið nokk. Sveinur Tróndarson, formaður í Kappingarnevndini, er ógvuliga varin, tá vit seta honum spurningin, um FSF við støði í ítøkiliga málinum fer at seta discipliner-revsing á dagsskrá aftur, men hann váttar, at spurningurin verður tikin upp.

- Í hesum konkreta førinum kann eg siga, at vit taka málið upp. Vit hava biðið ÍF um frágreiðing til tað, sum sagt varð, og síðani fara vit at viðgera hetta á fundi, sigur Sveinur Tróndarson.

- Hvør niðurstøðan verður, dugi eg sjálvandi ikki at siga her og nú. Men eg haldi, at tað má vera eitt mark fyri, hvussu tú úttalar teg eftir dyst. Sjálvandi skulu venjarar og spælarar hava loyvi at siga sína hugsan. Eisini um dómaraavrikið. Men tá hetta gevur úrslit í mest sum persónligari niðurgerð av dómara ella øðrum ábyrgdarfólki, eru vit farin ov langt, sigur Sveinur Tróndarson.

Og formaðurin í Kappingarnevndini leggur dent á, at hann fegin sær ein greiða linju í politikkinum hjá FSF í so máta.

- Vit mugu ikki enda í eini støðu, har nakrir persónar verða revsaðir, meðan aðrir sleppa lættari avstað. Ein linja má leggjast, og so er tað okkara uppgáva at arbeiða kontinuerligt eftir hesari, sigur hann.

### Heimild at revsa

Um so er, at Kappingarnevndin tekur støðu til, at leikbann eigur at gevast, hevur nevndin fulla heimild til hetta. Kappingarreglurnar áseta, at fyri óhøviskan atburð kann nevndin geva leikbann upp til tríggjar dystir.

Verður ramman nýtt fult út, kann hetta kærast til Aganevndina. Men velur nevndin hinvegin, at leikbann skal gevast í ein ella tveir dystir, verður hetta roknað sum endalig avgerð. Reglurnar áseta nevnliga, at tað bert er við leikbanni, sum fevnir um í minsta lagi tríggjar dystir, at mál kunnu kærast víðari til Aganevndina.

## Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum.**

*»Nýggjur heilivágur móti svøvnloysi. Bryggjaður í Gundadali. Navn: B36«*

*»KÍ var fleiri klassar betur enn Bgyppe60 í dag«*

*»Eru TB'arar so vánaligir taparar, at teir ikki vilja úttala seg :-)«*

*»KÍ manglaði Ova Nysted at skjóta fríspørkini í dag. Hevði Ove verið við, so høvdu vit vunnið«*

*»Jens Erik Rasmussen er sum vín. Hann verður betri við aldrinum«*

*»Ikki ein góður dystur hjá B36, men vit koma sterkt aftur. Annars til tykkum, sum havast at dómaranum, skal eg siga, at teir gera sítt besta. SETIÐ TYKKUM INN Í FÓTBÓLTSREGLURNAR, ÁÐRENN TIT BROKKA TYKKUM!«*

*»Soleiðis gongur tað, tá mann undirmetir Skála haha:-) go go Skála«*

*»Óluksáligt at er steðgur nú í 2 vikur fyri ÍF, tað koyrir bara«*

*»B68 skuldi vunnið dystin. KÍ løgdu seg heilt inn til málmannin at verja«*

*»...Bara ergurligt at liðið dettur aftur á 16-meturin, tá vit koma framum! B36-dysturin skal vinnast!«*

*»Kanska er tað ein grund til, at B36 spældi so illa... Skála forðaði teimum. Veldugt Skála«*

*»Øll sunnara helvt má koma á Tvøroyri ónskvøldið at stuðla ogra liði. Tað verður ein sera sera strævin dystur«*

*»Gott kempa ÍF :) tit eru bara super:)«*

*»ÍF vóru undirmettir av øllum, men nú hava tit víst øllum, hvat tit duga til«*

*»ÍF er best spælandi liðið í løtuni..., gott kempað ÍF«*

*»Gott kempa B68!! Men tit kunnu nógv meira enn hatta :-) Jóan Símun, tillukku við tí fyrsta málinum. Næstu ferð verða tað fleiri mál. KOYR á B68 :-D«*

*»ÍF vóru super í dag, og sjeikaligast!«*

*»Verri enn at síggja smápiltarnar hjá B36, fúl skomm«*

*»B36 tímdu ikki at spæla fótbólt í dag. Eingin geistur. Skála hevði fingið stig, sjálvt um teir ikki møttu upp«*

# Dómarans meting stendur við

**ÍF fekk einki burtur úr síni kæru um dómaraavrikið í dystinum millum NSÍ og ÍF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt eitt tap fingu fuglfirðingar eisini tvey reyð kort við sær, tá teir vitjaðu í Runavík mikukvøldið.

Ónøgdin um dómaraavrikið var somikið stór, at fuglfirðingar valdu at kæra hetta til FSF. ÍF vísti í hesum sambandi á, at tey als ikki mettu talan vera um brotsspark tær báðar ferðirnar, sum dómarin gav NSÍ møguleikan úr 11 metrum, og hartil vildu tey í ÍF vera við, at talan var um tjúkka rangstøðu, tá Óli Hansen skoraði sigursmálið í dystinum.

Kravið var í fyrsta umfari, at FSF ásetti nýggjan dyst, og í øðrum lagi, at leikbannini hjá Alexander Jovevic og Balazs Sinko vórðu strikað.

### Dómarans meting

Tá talan var um kæru um leikbann, boðaði Kappingarnevndin hjá FSF alt fyri eitt frá, at málið skuldi viðgerast, áðrenn komandi umfarið.

Tí hevði nevndin fund leygardagin, men hetta hjálpti nú ikki ÍF tað stóra. Ein ófrávíkilig regla innan ítróttarheimin er, at dómarans meting kann ikki broytast, og hetta vísti Kappingarnevndin eisini á í sínum svari til ÍF.

»Dómarin og hjálpardómararnir í nevnda dysti lúka tær treytir, sum eru kravdar fyri at døma í Formuladeildini. Í einum fótbóltsdysti er tað dómarin, sum saman við hjálpardómarunum dømir dystin, og er tað meting dómarans sum ger av, hvussu dømt verður. Vísandi til grein-5 í Fótbóltslógini eru avgerðir dómarans endaligar«, sigur Kappingarnevndin millum annað í sínum úrskurði í málinum.